gult12 cyan12 magenta12 svart12



FISKIVINNUTÍÐINDI

# Gólvsølan

| Sýslu-nummar | Skipanavn | Reiðskapur | kilo |
|---|---|---|---|
| FD 18 | SIRIÐ | LÍNA | 267 |
| FD 102 | BYLGJAN | LÍNA | 922 |
| FD 115 | SJÓBERIÐ | LÍNA | 57 |
| FD 136 | LILJA | LÍNA | 602 |
| FD 205 | GRETA | LÍNA | 1.349 |
| FD 222 | GAMLI EDVARD | LÍNA | 644 |
| FD 235 | STREYMSTEINUR | LÍNA | 398 |
| FD 250 | HALGERÐ | LÍNA | 634 |
| FD 258 | TINNA | LÍNA | 663 |
| FD 361 | SÚLAN | LÍNA | 978 |
| FD 377 | JULIA | LÍNA | 1.349 |
| FD 428 | MARGIT J | LÍNA | 177 |
| FD 492 | KLETTUR | LÍNA | 310 |
| FD 553 | BRANDUR | LÍNA | 1.371 |
| FD 591 | MARIA | LÍNA | 103 |
| FD 67 | HULDUSTEINUR | LÍNA | 682 |
| FD 783 | GLÚPUR | LÍNA | 2.908 |
| FD 905 | TRÚGVI | LÍNA | 1.128 |
| FD1038 | STRÚKUR | SNELLA | 67 |
| FD1054 | ALDUBÁRAN | LÍNA | 331 |
| FD1110 | ARCTIC | LÍNA | 234 |
| FD1148 | HELLISBERG | LÍNA | 309 |
| KG 125 | BJARNABERG | LÍNA | 665 |
| KG 129 | BRATTABERG | LÍNA | 624 |
| KG 171 | NÚPISKLETTUR | LÍNA | 512 |
| KG 189 | VÁTIKLETTUR | LÍNA | 781 |
| KG 288 | HELTNIN | LÍNA | 653 |
| KG 391 | EYSTURHØVDI | LÍNA | 410 |
| KG 423 | JASPISSTEINUR | SNELLA | 93 |
| KG 430 | BÁRAN | LÍNA | 1.576 |
| KG 452 | BEINISSVØRÐ | SNELLA | 106 |
| KG 512 | NESHAMAR | SNELLA | 95 |
| KG 608 | HERDIS | LÍNA | 586 |
| KG 642 | BRAGD | LÍNA | 921 |
| KG 703 | HENNY | LÍNA | 628 |
| KG 708 | VÁRSÓL | LÍNA | 294 |
| KG 743 | ELSA | LÍNA | 450 |
| KG 79 | NEVIÐ REYÐA | LÍNA | 2.177 |
| KG 92 | ØLDAN | SNELLA | 237 |
| KG 94 | BRID FORD | LÍNA | 296 |
| TG 10 | EVI | SNELLA | 592 |
| TG 14 | HEYKUR | LÍNA | 1.141 |
| TG 147 | HAVRENNINGUR | SNELLA | 492 |
| TG 159 | VESTURBÚGVIN | SNELLA | 474 |
| TG 185 | EGIL | SNELLA | 195 |
| TG 26 | MAJBRITT | SNELLA | 432 |
| TG 283 | HERDIS | SNELLA | 691 |

| Sýslu-nummar | Skipanavn | Reiðskapur | kilo |
|---|---|---|---|
| TG 303 | RICHARD Í SMIÐJUNI | SNELLA | 128 |
| TG 310 | SJÓRIDDARIN | SNELLA | 467 |
| TG 349 | TRÝ DRANGUR | SNELLA | 679 |
| TG 397 | KVIKK | SNELLA | 279 |
| TG 40 | KAMBUR | SNELLA | 223 |
| TG 41 | VESTURSKIN | SNELLA | 109 |
| TG 495 | EGIL M | SNELLA | 413 |
| TG 514 | KELDAFOSSUR | SNELLA | 233 |
| TG 523 | SÓLEY | SNELLA | 163 |
| TG 56 | MARIAN M. | SNELLA | 398 |
| TG 592 | JENNY B | SNELLA | 865 |
| TG 60 | SJÓFARIÐ | SNELLA | 232 |
| TG 609 | RÁAKLETTUR | SNELLA | 268 |
| TG 615 | JONNA M/B | SNELLA | 116 |
| TG 620 | BERGUR II | SNELLA | 236 |
| TG 622 | VARÐIN | SNELLA | 270 |
| TG 628 | ALIS T | LÍNA | 424 |
| TG 631 | SKARSTEIN | SNELLA | 1.189 |
| TG 670 | VÍKABERG | SNELLA | 1.085 |
| TG 731 | ANNIE M/B | SNELLA | 451 |
| TG 797 | NORÐFARIÐ | LÍNA | 1.135 |
| TG 802 | BRATTANES | SNELLA | 241 |
| TG 91 | STJØRNAN | SNELLA | 189 |
| TN 63 | LILJAN | SNELLA | 232 |
| TN 260 | MONICA | SNELLA | 41 |
| TN 3 | NÓSI | SNELLA | 109 |
| TN 329 | NEPTUN | SNELLA | 57 |
| TN 389 | FØSTUVARÐI | PARTROL | 302 |
| TN 390 | TRÝ SYSTKIN | LÍNA | 797 |
| TN 483 | ÆGIR | LÍNA | 6.077 |
| TN 708 | SELVÍKIN | SNELLA | 146 |
| TN 712 | TEISTAKLETTUR | LÍNA | 342 |
| TN 718 | HVÍTABERG | LÍNA | 1.720 |
| TN 723 | BRATTASKORÐ | LÍNA | 279 |
| TN 728 | PANDY | LÍNA | 781 |
| TN 753 | TÓRA | LÍNA | 1.625 |
| TN 90 | NORÐBÚGVIN | PARTROL | 281 |
| TN 976 | FINNURIN | SNELLA | 181 |
| TN 998 | FÝRA SYSTRAR | SNELLA | 184 |
| TN1090 | ANNIKA | LÍNA | 981 |
| VA 105 | BARIÐ | SNELLA | 105 |
| VA 109 | ELLA | LÍNA | 572 |
| VA 135 | HAVFRÚGVIN | SNELLA | 102 |
| VA 190 | SJÓBERIÐ | SNELLA | 214 |
| VA 221 | CARINA | SNELLA | 303 |
| VA 294 | NESTANGI | LÍNA | 553 |
| VA 34 | DUNGA HANS M/B | SNELLA | 753 |

| Sýslu-nummar | Skipanavn | Reiðskapur | kilo |
|---|---|---|---|
| VA 81 | GUTTA JÓGVAN | SNELLA | 410 |
| VA 82 | RAÐNES | SNELLA | 132 |
| VN 25 | TOFTAFOSSUR | LÍNA | 776 |
| VN 301 | NÓSIN | SNELLA | 140 |
| VN 409 | NORÐBERG | LÍNA | 245 |

| Vørunavn | kilo |
|---|---|
| BROSMA 0 | 524 |
| BROSMA 2 | 1 |
| BROSMA 3 | 32 |
| BROSMA 3&4 | 50 |
| HÝSA 0 | 3 |
| HÝSA 1 | 3.922 |
| HÝSA 2 | 6.159 |
| HÝSA 3 | 4.491 |
| HÝSA 4 | 1.277 |
| HÝSA 5 | 2 |
| HAVTASKA 0 | 62 |
| HVASSKVOYSA | 3 |
| HVÍTINGUR 0 | 12.394 |
| KALVI 1 | 40 |
| KALVI 3 | 4 |
| KALVI 4 | 5 |
| KONGAFISKUR 0 | 34 |
| LONGA 0 | 83 |
| LONGA 4&5 | 9 |
| REYÐSPRØKA 0 | 7 |
| SKØTA | 73 |
| SKRUBBA | 37 |
| STEINBÍTUR | 207 |
| TOSKUR 1 | 68 |
| TOSKUR 2 | 2.466 |
| TOSKUR 3 | 10.761 |
| TOSKUR 4 | 8.302 |
| TOSKUR 5 | 4.806 |
| TUNGA 0 | 15 |
| UPSI 0 | 1.195 |
| UPSI 2 | 868 |
| UPSI 3 | 431 |
| UPSI 4 | 506 |

## Toskaprísurin aftur góður

Í gjár vóru seld 58 tons á gólvsøluni hjá Fiskamarknaði Føroya og miðalprísurin var 13,65 krónur. Toskurin lá úr 23,65 fyri tosk 1 og niður í 9,32 fyri tosk 5. Mest var selt av toski3 , tíggju tins og hesin fór fyri 19,95 krónur í meðal.

Hýsa 0 varð seld fyri 12.00, hýsa 1. fyri 18,37, hýsa 2. fyri 16,65 og hýsa 3. fyri 13,39. Talan er um meðalprísir.

Upsaprísurin er enn lágur. týsdagin var hægsti prísur fyri upsa 5.30 kr og lægsti ptísur fyri upsa var eina krónu.

Longan varð seld fri omanfyri 10 krónur fyri kiloið og brosma fór fyri fýra krónur í meðal.

Kalvin hevði sum vant besta prísin. Kalvi 1. fór fyri 68 krónur í meðal og kalvi 3 fyri 44 krónur kiloið.

Reyðspøkan, sum trolbátarnir á landleiðini skuldu fingið eitt sindur av, fór fyri 11 krónur kiloið.

## Kongafiskur var ikki kongafiskur

*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Herfyri var nógv blaðskriving um allar kongafiskin russiskir svartkjaftabátar fingu sum hjáveiðu, tá teir royna eftir svartkjafti undir Føroyum. Føroyskir djúpvatnstrolarar søgdu, at tá teir komu fram við russisku trolarunum á svartkjaftaleiðunum, so vóru tey reyð av kongafiski.

Í fjør bar rættuliga av, tá uppgóvu russar, at teir høvdu veitt 2500 tons av kongafiski.



Savnsmynd

- Men hetta passaði ikki heilt, tí vit kannaðu nógvar russiskar svartkjaftabátar, tað var serliga í apríl, mai og juni í fjør, at teir skuldu havt fingið so nógvan kongafisk, og vit funnu næstan einki umborð. Vit hava endurtikið kanningarnar í ár og úrslitið er tað sama. Russar veiða næstan ongan kongafisk, sigur Elmar Højgaard á Vaktar og Bjargingartænastuni.

- Herfyri var ein sendinevnd av russiskum eftirlitsmonnum í Føroyum og vit tóku málið upp. Teir kannaðu fiskiveiðudagbøkurnar í Russlandi og nú vísir tað seg, at kotan fyri onnur fiskasløg er komin í bland. Nógvi kongafiskurin hjá russisku svartkjaftaskipunum er ikki kongafiskur, men gulllaksur og ansjosir. Ella eitt serligt slag av ansjosum, sum verður kallaður fyri prikkafiskur og sum finst upp í sjónum, serliga á djúpum vatni. Orsøkin til at vit ikki hava sæð hendan fisk umborð á russiski skipunum er, at hann verður ikki nýttur til matna, men malin til mjøl beinanvegin, sigur Elmar Højgaard.

- Vit hava mangan hoyrt, at russararnir skulu hava veitt nógvan kongafisk, men vit kanna lastirnar hjá russum regluliga seinastu mongu árini og kongafisk av týdningi hava teir ongantíð fingið, sigur Elmar Højgaard.

gult13 cyan13 magenta13 svart13



# Løgreglan klár til oljuleiting

**Um stutta tíð verður arbeiðsøkið hjá føroyskum løgreglufólki munandi víðkað, tá fyrsti boripallurin verður ankraður á landgrunninum 100 fjórðingar úr landi. Pallurin er at meta sum onnur ábyrgdarøki á landi hjá løgregluni**

LØGREGLA OG OLJA

*Jan Müller*



*Umboð fyri føroyska og norska løgreglu og fyri Statoil og Transocean á skeiði í Havn.*

*Mynd Jonhard Hammer*

Komandi oljuleiting, sum er beint í durunum – sett verður á at bora um góðar tvær vikur ella so – fer at vera ein nýggj avbjóðing fyri fleiri ymsar tættir í føroyska samfelagnum. Eitt nú fyri løgregluna. Við eitt verður arbeiðs- og ábyrgdarøkið hjá føroyskum løgreglufólki munandi broytt. Skjótt hevur løgreglan eisini til uppgávu at taka sær av tí, sum fer fram umborð á boripalli 100 fjórðingar úr landi.

Tað var í hesum sambandi, at løgreglufólk herfyri vóru á skúlabonki fyri at hoyra, hvørjar nýggjar uppgávur verða og hvussu hesar skulu loysast, nú fyrsti boripallurin nakrantíð kemur inn í føroyskt farvatn.

Tá ein boripallur verður fluttur er hann at meta sum eitt fartoy, og tá eru altjóða sjóreglar galdandi. Men tá pallurin er komin uppá pláss og er forankraður á landgrunninum, er hann ein fast installatión. Tá er eisini eitt trygdarøki uppá 500 metrar bæði sjó- og loftvegis. Í hesum økinum er føroysk og donsk lóggáva, sum er galdandi í Føroyum, í gildi. Við øðrum orðin fær tú her 100 fjórðingar úr Føroyum eitt føroyskt samfelag, har lógir og reglar, sum eru galdandi á landi, eisini eru galdandi har.

Hendir ein stór arbeiðsvanlukka á pallinum í heyst, so hevur føroysk løgregla skyldu til at taka sær av hesum og eitt nú at gera neyðugu kanningarnar.

Hetta er ein heilt nýggj avbjóðing fyri løgregluna sigur Jón Klein Olsen, løgregluovasti, sum hevur høvuðsábyrgdina av júst hesum økinum. Umborð verður arbeitt eftir serstøkum trygdarreglum, og skulu føroysk løgreglufólk fara umborð á pall og gera eitt arbeiði har, so mugu tey eisini hava innlit í arbeiðið umborð. Í tí sambandi hevur føroyska løgreglan tikið upp tætt samstarv við politiið í Stavanger og hevur man so tillagað tilfarið til føroyska lóggávu og viðurskifti.

Tað var í hesum sambandi, at tað herfyri varð skipað fyri einum skeiði í Havn, har politi úr Stavanger legði lag á og greiddi frá teirra royndum. Eisini vóru tvey fólk frá Statoil í Noregi og tvey frá Transocean við. Transocean er heimsins størsta pallfelag og eigur tað boripallin Sovereign Explorer, sum skal bora fyri Statoil og fyri Amerada Hess í Føroyum. Talan var um eitt tekniskt og taktiskt offshoreskeið fyri politifólk.

Jón Klein Olsen heldur tað vera rætt at fáa fólk til Føroya at halda slík skeið heldur enn at fara av landinum við fólkinum. Tað verður bíligari og tá verður tað eisini út frá føroyskum viðurskiftum. Løgreglan hevur annars gjørt eina sera góða avtalu við tyrlutænastuna hjá Atlantsflog. Teir venja regluliga einaferð um vikuna og venja seks løgreglufólk saman við teimum. So her avloysir tyrlan vanligu politibilarnar. Tíðin at flúgva út til pallin tekur umleið fimm korter.

Jón Klein Olsen dylur ikki fyri, at teir eisini gera seg út til at taka sær av umhvørvisfólki, um tey fara at leggja seg út við føroyska lóg. Í hesum og øðrum sambandi hava teir eisini tætt samstarv við Grampian Police. – Tað er vert at vera fyrireikaður so væl sum gjørligt. Mánadagin vóru umboð fyri løgrregluni á kanningarferð umborð á boripallinum Sovereign Explorer, sum í løtuni er í írskum sjógvi.

Olav Jøppedal frá løgregluni í Stavanger, sum var við á skeiðnum, heldur føroyingar verða førar fyri at taka sær av teimum løgregluuppgávum, sum verða í leititíðini. Hann heldur ikki, út frá teirra royndum, at umhvørvisfelagsskapir eru stóri trupulleikin, men meira stórar vanlukkur.

# Um at verða klárt til boring

**Seinastu dagarnar hava fólk frá oljuumsiting og øðrum almennum stovnum verið á kanningarferð umborð á Sovereign Explorer í Írlandi, áðrenn hann skal bora á landgrunninum. Í gjár var ein »boring á pappírinum« roynd á Hotel Føroyum, har farið varð ígjøgnum øll lið og smálutir í eini veruligari boring. Borurin verður settur í umleið 1. juli**

UNDAN FYRSTU BORINGINI

*Jan Müller*



*Alex Buvik er nøgdur við gongdina higartil og heldur myndugleikar og vinnu um at vera klár til fyrstu boringina*

Hesar seinastu tvær vikurnar hava fólk, sum hava eitthvørt tilknýti til komandi boring á landgrunninum vitjað umborð á boripallinum, sum skal bora fyri bæði Statoil og Amerada Hess. Millum teirra er Alex Buvik, sum er maðurin, ið kanska meira enn nakar hevur fingurin á pulsinum, nú trý útlendsk oljusamtøk skulu hava loyvi til at fara undir boring á landgrunninum. Hann hevur arbeitt hjá Oljumálastýrinum nú í nøkur ár. Undan tað hevur hann drúgvar royndir frá eitt nú arbeiði umborð á oljupallum í norskum øki.

Talan er um at kanna viðurskiftini umborð á pallinum, áðrenn hann í næstum kemur inn í føroyskan sjógv. Buvik sigur, at pallurin kann brúkast í føroyskum øki, tá nøkur viðurskifti umborð eru broytt. Hetta hevur Statoil sum operatørur fingið at vita og eru teir í løtuni í ferð við at gera hesar broytingar. Hetta er nakað, sum skal vera í lagi, áðrenn farið verður at bora her. Buvik heldur ikki, at hetta er nakar trupulleiki. Talan er um krøv, sum ikki verða sett í írskum øki. Sosialurin skilur at hesar broytingar fara ikki at seinka komandi boring. Við hesum broytingum lýkur pallurin krøvini frá føroyskum myndugleikum.

Føroysku umboðini steðgaðu í 2 tímar umborð á pallinum. Talan er um tveir bólkar, sum vitja umborð. Hin vitjaði umborð mánadagin. Sjálvur hevur Buvik verið umborð á boripalli í mong ár, so hann kendi seg heima aftur, nú vitjað varð umborð á Sovereign Explorer.

Spurdur um føroyingar skulu kenna seg tryggar, nú farið verður undir at bora sigur Alex Buvik, at tá talan er um krøvini til umhvørvi, trygd, heilsu ol. so liggja Føroyar kanska fremst í verðini. Honum dámar væl føroysku lógirnar á hesum øki og er sjálvur fegin um at vera við í hesum arbeiði, sum nú tikist kunna byrja.

Eisini tilbúgvingin er um at vera klár. Tað verður ikki gamla Telegrafstøðin, sum fer at verða brúkt til leitingina frá byrjan. Tað verður Marinustøðin, sum fer at taka sær av hesum í eina tíð. So talan verður um eitt tætt samarbeiði millum V&B og Marinustøðina.

### Bora á pappírinum

Hesa vikuna og í næstu viku verða so gjørdar seinastu fyrireikingarnar til komandi boring, sum nú er ásett til at verða umleið 1. juli. Boriliðið hjá Statoil, sum telur einir 12-14 fólk við Helge Håland, boristjóra á odda, hevði eina venjing á Hotel Føroyum í gjár, har »borað varð á pappírinum«. Tvs. at ein boring varð gjøgnumgingin frá A til Z saman við veitarum o.ø. Í næstu viku verður so ein tilbúgvingarætlan roynd í praksis.

### NSOAF fundur í Tórshavn

Sum ein liður í menningini av trygdini í frálandavinnuni hevur Oljumálastýrið síðan 1998 umboðað Føroyar í myndugleikafelagsskapinum NSOAF (North Sea Offshore Authority Forum). Endamálið við NSOAF er at geva myndugleikum við ábyrgd fyri trygdini á landgrunninum í londunum kring Norðsjógvin, eitt forum, har tey kunnu hittast og umrøða trygdarspurningar, royndir, rák o.líkn.

Limalondini hittast eina ferð um árið, og vóru Føroyar vertsland fyri ársfundin hjá NSOAF, tá umboð fyri trygdarmyndugleikar úr Danmark, Hálandi, Írlandi, Noregi, Stórabretlandi, Svøríki og Týsklandi hittust í Føroyum.

Afturvendandi mál á skránni vóru m.a. frágreiðingar um tilburðir og vanlukkur, sum knýta seg til frálandavirksemið, í farna ári. Harumframt upplýstu limalondini um nýggjar trygdarlógir, reglur o.a. av týdningi fyri olju- og gassvirksemið í økinum. Í hesum sambandi greiddi Oljumálastýrið frá um kunngerðina um heilsu, trygd og umhvørvi í sambandi við leitivirksemi, sum varð sett í gildi í mars mánaða.

Árligu fundirnir í NSOAF skulu tryggja, at eitt felags stev verður funnið í arbeiðinum at betra trygdar- og heilsustøðið innan olju- og gassídnaðin til havs, við atliti at eini støðugari menning av frálandavinnuni í Norðsjóvarøkinum. Alex Buvik, sum umboðaði Føroayr á fundinum sigur, at har kom mangt áhugavert fram. Hann vísir á, at vit eru í tí hepnu støðu, at vit kunnu læra av royndunum, sum aðrir hava gjørt og at vit út frá hesum og út frá okkara egnu viðurskiftum hava gjørt okkara egnu skipanir. Hesar eru fult á hædd við tað í øðrum londum.



*Boriliðið hjá Statoil er við at vera klárt til fyrstu boringina.*

*Mynd Jens K Vang*